## EB/Streymur

**EB/Streymur bjóðar øllum dreingjum og gentum at gerða lið til innandurakapping í fótbólti í Høllini á Eiði 26. februar 2005**

Aldursbólkarnir eru hesir:

| | | |
|---|---|---|
| Pinkur | føðingarár | 1995-1996 |
| Gentur 10-12 | føðingarár | 1993-1994 |
| Smágentur 12-14 | føðingarár | 1991-1992 |
| Gentur 14-17 | føðingarár | 1988-1990 |
| Smápiltar | føðingarár | 1995-1996 |
| Piltar | føðingarár | 1993-1994 |
| Smádreingir | føðingarár | 1991-1992 |
| Dreingir | føðingarár | 1989-1990 |

Á hvørjum liði leika 5 leikarar málmaður íroknaður

Tó i deildunum gentur 14-17 og dreingjum eru bert 4 leikarar.

Loyvt er at hava ein skiftisleikara.

Liðini skulu hava Fótbóltsnøvn
(EB/Streymur, Liverpool, HB,Inter o.s.fr)

Luttøkugjaldið er kr. 200,00 fyri hvørt liðið.

Tilmelding á tlf. 508090 - 213799 - 212611- 213465

**Seinasta freist at melda til luttøku er hósdagin 24. februar 2005**

**EB/STREYMUR**

Framsýning av verkum eftir

## EYVIND DALSGAARD

Av Mølini í Skálavík (1905-1952)



**Smiðjan í Lítluvík**
26. feb - 07. Mars 2005
Opið er frá kl. 14-18

Frá S & K felagnum

Eykaaðalfundur verður í hølum felagsins, Traðarvegur 20, Tórshavn

**leygardagin 12. mars kl. 16.00**

við hesi dagsskrá:

1. Lógarbroytingar.

**S & K felagið**

**Heimarøktin og Serforsorgin**
*Deildin fyri sinnisveik/Stuðulsskipanin fyri vaksin*

# Fíggjarfulltrúi

## til Deildina fyri sinnisveik og Stuðulsskipanina fyri vaksin

Deildin fyri sinnisveik umsitur sambýlið á Fobbakletti í Sandavági. Harafturat hevur stovnurin framhaldandi eftirlit við bústovnunum á Fugloyarvegi og í Torfinsgøtu í Tórshavn og sambýlunum Sólteigur og Eysturstræti í Tórshavn.

Stuðulsskipanin fyri vaksin hevur til endamáls at veita sosialpedagogiska hjálp, fylgi, eftiransan og umsorgan til heimabúgvandi persónar millum 18 og 66 ár um alt landið. Í løtuni eru uml. 100 persónar, ið fáa stuðul frá skipanini.

**Arbeiðið hjá fíggjarfulltrúanum fevnir um:**
- At leggja roknskaparhaldið hjá Deildini fyri sinnisveik og Stuðulsskipanini fyri vaksin tilrættis sambært roknskaparreglum landsins og at menna hetta samsvarandi hesum.
- At hava mánaðarligt eftirlit við rakstrinum hjá stovnunum.
- At gera mannagongdir og vegleiðingar v.m. og verða við til at seta tær í verk.
- At fyriskipa fíggjarlógararbeiðið.
- At tryggja eitt so einsháttað og gjøgnumskoðiligt datagrundarlag sum gjørligt.
- Árliga góðkenna roknskapir hjá sjálvsognarstovnunum mótvegis leiðar-anum.
- At lýsa og greina fíggjarstøðurnar, virksemi og tænastustøðið hjá stovnin-um.
- Skrivari hjá leiðaranum.

**Førleikakrøv**
**Vit vænta at:**
- Tú hevur evni at greina og arbeiða við tølum.
- Tú dugur væl at orða teg skrivliga og munnliga.
- Tú hevur eina positiva menniskjafatan.
- Tú arbeiðir skipað og hevur hug at arbeiða í einum tvørfakligum umhvørvi.
- Tú er opin og virkisfýsin.
- Tú trívist í einum virknum og jaligum arbeiðsumhvørvi.
- Tú hevur góð samstarvsevni.
- Tú hevur eina viðkomandi útbúgving og royndir innan fíggjararbeiði og almenna umsiting.

**Deildin fyri sinnisveik/Stuðulsskipanin fyri vaksin kann bjóða:**
- Ein virknan starvsfólkahóp við humor og umsorgan fyri hvørjum øðrum.
- Tvørfakliga supervision.
- Eitt gott og mennandi arbeiðspláss í støðugari broyting.

**Lønar- og setanartreytir:**
Talan er um eitt fast starv innan Heimarøktina og Serforsorgina.

Løn sambært Starvsmannafelagnum og/ella Búskapar- og Løgfrøðingafel-agnum og Fíggjarmálaráðnum.

Fleiri upplýsingar um starvið eru at fáa hjá leiðaranum Regin Johansen, tlf. 354020.

Starvið verður sett 01.04.2005 ella skjótast aftaná.

Umsóknarfreistin er sett til fríggjadagin 18.03.2005 og umsóknir við prógvum og møguligum viðmælum skulu sendast til:

**Deildin fyri sinnisveik/Stuðulsskipanin fyri vaksin**
Att. Regin Johansen
Løkjatún 1, 160 Argir

# Koyri-kort?

Nýggj teoriskeið til persónbil, byrja **týsdagin 1. marts kl. 17**

FØRARASETRIÐ
KOYRISKÚLI

**Stanley A. Olsen**
koyrilærari
tel 21 10 99 • 21 10 96

**John A. Christiansen**
koyrilærari
tel 21 47 75

**Jekaragøta 10 • Tórshavn**

i

Sosialurin

# Stuðulsfelagið VB

Eykaaðalfundur verður í VB-húsinum fríggjakvøldið 25. februar kl. 19.00.

**Stuðulsfelagið VB**

Sosialurin